FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY

## Stýrimaður til
# »Magnus Heinason«

Til »Magnus Heinason« verður søkt eftir avloysara fyri stýrimann, sum er farin í annað starv. Starvið verður sett til 6. juni 2008.

»Magnus Heinason« ger kanningar fyri Fiskirannsóknarstovuna, m.a. av havfrøði, æti, yngli, botnfiski, uppsjóarfiski og reiðskapi. Ein part av tíðini er skipið eisini til vanligan fiskiskap. Stýrimaðurin skal saman við skiparanum hava ábyrgdina av at føra skipið og annars gera tað arbeiðið, sum vanliga hoyrir stýrimanninum til og sum eru álagdar honum av skiparanum. Stýrimaðurin hevur eisini dagligu ábyrgdina av at stíla fyri arbeiðinum á dekkinum.

Stýrimaðurin skal hava hollar royndir og hava neyðuga útbúgving og vinnubræv og annars uppfylla øll krøv, sum vera sett av myndugleikum til tann, sum skal útinna starvið.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Umsóknarfreistin er 10. juli 2007. Umsóknir við prógvum, yrkisgongd (curriculum vitae), viðmælum o.ø. skulu sendast til Fiskirannsóknarstovuna, Postrúm 3051, Nóatún 1, FO 110 Tórshavn. Starvið verður sett skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna á tlf. +298 353900.

# FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9^00^-17^00^*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

Deyvafelag Føroya

## Søkir eftir
# Skrivstovufólki

Í samband við at skrivstovufólk okkara fer í farloyvi, søkist eftir einum skrivstovufólki til setan frá 1. august 2007 og fram til summarið 2008. Talan er um eitt hálvtíðarstarv.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**

- Dagliga gongdin hjá Deyvafelagnum og Deyvahúsinum.
- At fyrisita Deyvafelagið undir leiðslu av nevnd felagsins.
- At skipa fyri fundum í Deyvafelagnum.
- Samskifti Deyvafelagsins við almennu myndugleikarnar.
- Samskifti Deyvafelagsins við tænastuveitandi stovnar, t.d. viðv. Sjónvarp Føroya o.ø..
- Samskifti Deyvafelagsins við útheimin m.a. Norðurlandaráðið hjá Deyvum og Danske Døves Landsforbund.
- At savna tilfar til heimasíðu Deyvafelagsins – www.deaf.fo.
- At hjálpa leiðsluni (nevndini) í Deyvafelagnum at fyriskipa tiltøkum Deyvafelagsins.
- Dagliga samskiftinum við limir Deyvafelagsins.
- Innsavning til rakstur Deyvafelagsins.
- Dagliga rakstrinum (m.a. útleiguvirksemi) og viðlíkahald av Deyvahúsinum.

**Neyðug førleikakrøv og persónsmenska:**
Søkt verður eftir fólki, ið kann arbeiða sjálvstøðugt, hevur útbúgving og royndir innan vanligt skrivstovuarbeiði og annars røkja omanfyrinevndu uppgávurnar.

Men fyrst og fremst verður dentur lagdur á, at umsøkjarin hevur hug og hegni at seta seg inn í viðurskiftini teirra deyvu, at taka til sín deyvamentanina, at hava áhuga í at læra teknmál, og annars er sinnaður at brúka part av orku síni at menna lívsvirði teirra deyvu.

**Arbeiðstíð og løn:**
Starvið er ½-tíðarstarv, og verður arbeiðstíðin annars ásett í samráð við leiðslu Deyvafelagsins. Lønin er ásett sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til **Bjørg Hjelm á tlf.nr. 31 75 97 ella 51 75 97**

Umsóknir skulu verða Deyvafelagnum í hendi í seinasta lagi 23. juni 2007 og verður at senda skrivliga til

**Deyvafelag Føroya**
Postboks 2001
FO-165 Argir

# Sp/f Andrias Berg
## Entreprenørvirkið

Marinargøta 6 · 188 Hoyvík
Tlf. 31 65 58 / 21 65 58

**Søkt verður eftir førara til lítlan kranabil. Fyrimunur er, um viðkomandi eisini kann koyra gravimaskinu.**

**Talan verður um fast arbeiði.**

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

## Skrivstovufólk/málsviðgeri

**Starvið:**
Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í annað starv, er eitt áhugavert starv sum skrivstovufólk/málsviðgeri leyst at søkja á Stuðulsstovninum skjótast gjørligt ella frá 1. august 2007.

**Høvuðsuppgávur:**
- Málsviðgerð í ÚSUN-skipanini*
- Vanligar skrivstovuuppgávur

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH/student ella líknandi
- Góðan kunnleika til enskt í skrift og talu*
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv.
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanar- og lønartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, leiðara á telefon 35 68 00.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

**Stuðulsstovnin**
Stílað: Terja á Lakjuni
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO - 110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi **seinasta lagi 25. juni 2007.**

- Í ÚSUN-skipanini verður útbúgvingarstuðul veittur til tey, ið lesa uttanfyri Norðurlond. Tað er í hesum sambandi at kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

*Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Mentamálaráðnum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á **Stuðulsstovninum** starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.100 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.500 persónum. Stuðulsstovnurin hevur í 2007 eina útreiðslujáttan uppá 2,8 mió. kr., og veitir uml. 92 mió. kr. í lestrarstuðli.*

almannastovan

# HÚS ELLA ÍBÚÐ

Fyri eitt av starvsfólkum okkara verður sóknast eftir húsum ella íbúð til 1. august 2007.

**ALMANNASTOVAN**
Postboks 3096 · 110 Tórshavn